# Ítrótta FAGNAÐUR

## ÁRSINS ÍtróttaELDSÁL

***UPPSKOT:***

ÁRSINS ÍtróttaELDSÁL er ein sjálvboðin venjari, liðleiðari, stevnuábyrgdari, nevndarlimur, samskipari ella annar, ið við serligum innsatsi hevur viðvirkað til samanhaldið í sínum ítróttafelagi seinastu árini.

**Í grundgevingunum kunnu tit greiða frá, hvussu viðkomandi, sum tit skjóta upp, eitt nú:**

- Á serligan hátt styrkir og stimbrar til samanhaldið í felagnum
- Skapar gott vinarlag í felagnum
- Tekur ítrótt í álvara og er góð fyrimynd
- Hevur jaligan hugburð og góða orku
- Syrgir fyri, at høllin/vøllurin/breytin osv. er bíløgd til venjing ella kapping
- Altíð er klár/ur at hjálpa
- Ger, at felagið, liðini og limirnir arbeiða væl saman
- Altíð er til at stóla uppá

***Arbeiðsgongd:***

- Øll kunnu senda inn uppskot um, hvør skal fáa heiðurin sum árins ELDSÁL. Tann, sum verður skotin upp, skal hava virkað fyri at stimbra lið- og felagsandan á serstakan hátt seinastu árini.
- Nevnd Poul E Petersen tekur støðu til, hvør skal hava heiðurin sum ársins ÍtróttaELDSÁL.
- Ein persónur verður kosin ÍtróttaELDSÁL hvørt ár. Nevndin kann taka avgerð um, at eingin eldsál verður heiðrað.

**Innstillingar verða sendar inn við eini leinkju, sum verður send út við telduposti, ella løgd á heimasíðuna og SoMe**